# Í skúlagarð

**Mánadagin, 14. august, byrja 687 børn í 1. flokki kring landið. Og 4. flokkur, við 754 nemingum, skal fyri fyrstu ferð fáa undirvísing í enskum – í hesum sambandi er føroyskt undirvísingartilfar útkomið**

SKÚLABYRJAN
*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

Sosialurin prátaði stutt við stjóran á Argja skúla, Marjun Holm, um skúlabyrjanina 2006.

*Verða hesi børnini, sum nú byrja í 1. flokki, tikin fram um hini nú tey skulu PISA-kannast í 2015?*

- Nei, har verður eingin broyting. Vit hava tað somu játtanina at arbeiða við – hendan skúlabyrjanin verður sum í fjør. Tað verður sum undanfarin ár.

Tó er ein broyting fyri 4. flokk og 5. flokk. Tey í 4. fara, sum fyrsti føroyski 4. flokkur, at hava enskt. 5. flokkur skal hava fleiri tímar í enskum.

Skúlastjórin á Argja Skúla heldur, at móðurmálið skal styrkjast. Føroyskt skal fáa hægri raðfesting, tað skuldi fingið status sum móðurmál. Innihaldið kundi verið meiri fjølbroytt.

- Mann skuldi undirvíst í føroyskum, sum tað veruliga var eitt móðurmál.



*Næmingar av Argja skúla. 21 børn fara í 1. flokki á skúlanum á Argjum. Savnsmynd.*

# 21 skúlabørn byrja í 1. flokki á Argjum í ár

21 børn fara í 1. flokki á skúlanum á Argjum. Og spurningurin er um hesi børnini fara at fáa meiri undirvísing í føroyskum, nú hetta m.a. hevur verið frammi í politiska orðaskiftinum.

Búi Dahl lærari í føroyskum hjá 2. flokki. Honum dámar væl, at mann í politiska orðskiftinum tosar um at raðfesta føroyskt hægri enn gjørt hevur verið fyrr. Hann nevnir sum dømi, at donsku skúlabørnini hava uml. 10-12 tímar um vikuna av føroyskum, meðan okkara børn hava 7 tímar.

Hann hevur verið lærari á Argja skúla í fýra ár. Í fjør var hann lærari hjá tí 1. flokkinum, sum nú fer í 2. flokk.

Hann er rættiliga væl nøgdur við undirvísingartilfarið, sum er ætlað teimum fyrstu flokkunum, í lærugreinini føroyskt. Millum lærugreinarnar eru onnur fak verri fyri enn føroyskt, heldur Búi.

- Føroyskt er ikki ringast fyri, tá ið vit práta um tilfar til teir fyrstu flokkarnar, haldi eg sjálvur. Har eru bókarøðin "Hervør og Høgni" fyri fyrstu flokkarnar, sum hevur arbeiðshefti við, og tað er gott at arbeiða við. Tilfarið kundi kanska verið meiri fjølbroytt, um eg skal finnast at onkrum í tilfarinum.

Fyrr í vikuni var skrivað um at samstarvið millum dagstovn og skúla kundi verið gjørt ella skipað betri. Hesum er Búi samdur í.

- Jú, tað mann átti at fingið formaliserað samstarvið. Tað kann gerast betri, tað er kanska ov stirvi, haldi eg. Har er lítið samband í tí dagliga, børnini frá dagstovninum koma at vitja áðrenn skúlabyrjan. Men tað tykist, sum tey eru væl fyrireikaði, tá ið tey koma í fyrsta flokk.

**jj**

# Føroyskt undirvísingartilfar til enskt

ÚTGÁVA AV UNDIRVÍSINGARTILFARIÐ
*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

Landsstýrið og løgtingið hevur gjørt av at meiri enskt skal lærast í fólkaskúlanum. Og nú fer fyrsti føroyski 4. flokkur at fáa frálæru í enskum. Føroyskt undirvísingartilfar er framleitt til hesar 4. flokkarnar. Tað er Una Poulsen, lærari, sum hevur gjørt hesa útgávuroðina. Tríggjar bøkur mynda bókaheildina "Mandy on holiday", sum er ætlað 4. flokki. Søgan um Mandy fer fram í hansara heimbýi, Poulton. Mandy kemur til Føroya at halda frítíð, og m.a. er hann við og sær eitt grindadráp.

Í hesi útgávuni er skapað ein heild av orðum, myndum og eisini ljóðum, ið skal eggja og stimbra næming til at brúka enska málið. Í lesibókini er nevniliga fløga við upplestri av tekstunum í bókini, soleiðis kann næmuringin eisini heima við hús hoyra tekstin á enskum. Harafturat leggur forlagið teldutøkt tilfar út á netsíðuna www.fsg.fo" www.fsg.fo til næmingar og lærarar. Sum nú er, liggja lærarabók og avritssíður teldurtøkar til "Mandy on Holiday", siga tey av Føroya Skúlabókagrunni í tíðindaskrivi.

*Mandy on holiday. Í hesi útgávuni er skapað ein heild av orðum, litmyndum og eisini ljóðum, ið skal eggja og stimbra næming til at brúka enska málið. Í lesibókini er nevniliga fløga við upplestri av tekstunum í bókini*




*Mandy við í grind*

# 4. flokkur hevur í ár enskt

Á Venjingarskúlanum í Tórshavn er Fríðhildur Didriksen lærari í enskum hjá 4. flokki. Hetta er sum sagt fyrsta ferð, at 4. flokkur hevur enskt. Fríðhildur er væl nøgd við føroyska tilfarið, sum er gjørt til undirvísing. Tað er Una Poulsen, lærari, sum hevur gjørt hesa útgávurøðina við heitinum Mandy on Holiday.

- Tilfarið sær sera spennandi út. Nú havi eg ikki roynt tað enn í undirvísing, men tað sær spennandi út og eg gleði meg at fara í gongd. Hetta fer at vera grundtilfarið, sum vit fara at brúka, heilt sikkurt. Tilfarið í "Mandy on Holiday" er lesibók og sangir. Slíkt tilfar skuldi eisini verið gjørt til lærugreinina danskt, haldi eg.

Meiri undirvísingartilfar liggur eisini á heimasíðuni, hjá Føroya Skúlabókagrunni, sum mann kann brúka í enskum, sigur Fríðhildur Didriksen.

4. flokkur fer at hava tveir tímar av enskum á tímatalvuni. Og tað fer at snúgva seg um at føra børnini inn í eina uppliving av enska málinum, ein innleiðing.

**jj**